# Mentamálaráðið heiðrar Zacharias Heinesen og Jógvan Isaksen

**Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Zachariasi Heinesen, listamanni, og Jógvani Isaksen, rithøvundur fær Heiðursgávu Landsins frá Mentamálaráðnum mánadagin**

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrismaðurin í mentamálum letur virðislønina eftir tilmæli frá nevnd umboðandi føroysk listafólk. Virðislønin er kr. 150.000.

Til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal tann, ið fær virðislønina, hava skapað listarligt lívsverk á høgum listarligum støði ella hava skapað eitt ella fleiri listalig avrik, ið gera, at viðkomandi hevur uppiborið henda heiður.

### Týdningarmikil partur av føroyskari søgu

Nevndin, ið ger tilmæli til landsstýrismannin, sigur í grundgeving síni:

"Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Zachariasi Heinesen, fyrst og fremst fyri hansara framúr góðu listaverk og harumframt týdning hansara fyri myndlistina og menning hennara í Føroyum. Sagt verður um Zacharias Heinesen, at hann við síni sermerktu innliving í landslagið, sínum viðkvæmi í litunum og musikalsku strikum hevur verið við til at skapa ta mynd, sum er kend og elskað sum tann føroyska myndin. Zacharias Heinesen hevur ígjøgnum eina lívslanga listarliga tilgongd havt eina tráan eftir nýggjum avbjóðingum og margfeldi, men tað er kanska mest av øllum hansara heilt egna og djarva ekspressionistiska landslagsmynd, ið stendur sum ein varði eftir hann og sum eisini hevur kveikt listarliga neistan í mongum av okkara listafólkum. Zacharias Heinesen eigur ein týdningarmiklan part í føroyskari myndlistasøgu"

### Nærlagdur, gávumildur og arbeiðssamur

Umframt Mentanarvirðirsløn Landsins letur landsstýrismaðurin Heiðursgávu Landsins. Heiðursgávan er kr. 75.000 og verður latin einstaklingi, felagi ella fyritøku – t.d. bókaforlagi, tónlistaforlagi ella kóri – sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan týdning fyri føroyska list og/ella føroyska mentan og mentanarlív.

Nevndin hevur gjørt tilmæli til landsstýrismannin um at lata Jógvani Isaksen Heiðursgávu Landsins fyri 2006, og hon sigur í grundgeving sínari:

"Heiðursgáva Landsins verður latin Jógvani Isaksen fyri hansara fjølvirkna leiklut á tí føroyska mentanarpallinum. Sum bókmentafrøðingur hevur Jógvan í greinum, bókum og monografiskum lýsingum av einstøkum høvundum varpað ljós bæði á ritverkið og serstakliga á føroyskar bókmentir í seinasta triðingi av 20. øld. Sum rithøvundur hevur hann, við teimum vælskrivaðu og vælflættaðu skaldsøgunum um Hannis Martinsson, givið Føroyum sess í krimiskorini í heimsins bókmentahaga. Og sum útgevari hevur hann sum fáur givið nýggjari føroyskum fagurbókmentum, í bundnum sum óbundnum máli, prentligan útveg. Hansara leiklutur, sum eisini fevnir um ritstjóraarbeiði, framflutning av føroyskum bókmentum uttanlands, krimibøkur fyri ung og bókmentir um list, er samanumtikið eyðkendur av nærlagni, gávumildi og merkisverdum arbeiðssemi"

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, handar Mentanarvirðisløn og Heiðursgávu Landsins í Norðurlandahúsinum mánadagin 15. januar kl. 19.00.

# – Virðislønin skal brúkast til menning

*– Alt sum eg havi fingið fyri list mína, havi eg brúkt til at menna meg sum listamann, og henda virðisløn fer sama veg, sigur Zacharias Heinesen*



**Zacharias Heinesen er ovfarin av rósandi orðunum, sum standa í tilmælinum frá nevndini. – Alt eg havi fingið fyri mítt arbeiði, havi eg brúkt til at menna meg sum listamann, og tað fari eg eisini at nýta hesa virðislønina til, sigur hann**

LIST
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Ja, eg eri ovfarin av rósandi orðunum handa vegin frá, sigur Zacharias Heinesen, tá vit fáa orðið á hann, og spyrja hann eftir eini viðmerking, nú hann hevur fingið Mentanarvirðisløn Landsins og 150.000 krónur.

– Hóast eg eri greiður um, at virðislønin verður latin árliga, so havi eg í roynd og veru ikki roknað við hesum, sigur hann.

### Altjóða virðislønir

Zacharias Heinesen hevur verið virkin listamaður síðani 1965, eftir at hann hevði nomið sær útbúgving og vitan innan list í Íslandi og Danmark. Hann hevur sýnt fram bæði í øllum Norðurlondunum, serliga nógv í Danmark, men eisini hevur hann verið í bæði Paris og Berlin og víst fram.

Í dag hevur Mentamálaráðið kunngjørt, at hann fær Mentanarvirðisløn Landsins. Hetta er fyrsta viðurkenningin, Zacharias Heinesen fær í Føroyum, men samstundis eisini størsta viðurkenningin tú kanst fáa sum listamaður her á landi. Áður hevur Zacharias tó fingið aðrar viðurkenningar uttan úr heimi – Henry Herup minnilegatið, og ein altjóða kanadiskan prís fyri at hava myndprýtt 1000 krónu seðil okkara.

### Ikki bara føroyskt produkt

– Alt sum eg havi fingið fyri list mína, havi eg brúkt til at menna meg sum listamann, og henda virðisløn fer sama veg, sigur Zacharias Heinesen. Men 150.000 eru nógvir pengar, og Zacharias flennir og sigur, at hann nú má mennast øgiligt.

Í tilmælinum frá nevndini til landsstýrismannin verður sagt, at Zacharias Heinesen "hevur kveikt listarliga neistan í mongum av okkara listafólkum". Sjálvur hevur Zacharias Heinesen eisini sínar fyrimyndir, og nevnir hann modernistarnar í Evropa. Tað tíðarskeiðið endaði í 1973, men Zacharias Heinesen hevur altíð fingið íblástur hagani.

– Soleiðis hevur tað, eg havi avrikað ikki bara verið eitt føroyskt produkt, tí onnur fólk skulu eisini kenna seg aftur í tí, greiðir Zacharias Heinesen frá.

Hann sigur, at sum listamaður gert tú tær altíð nakrar tankar og nøkur hugskot um nøkur ting, tú átti at gjørt, og nógv av teimum er hann als ikki komin til enn.

– Men tað vóni eg at eg geri, um eg havi tíð og heilsu til tað, sigur hann.

### Fegnast um Jógvan

Tað verður mikudagin, at virðislønin verður handað Zachariasi Heinesen, men tað tekur kortini onki av gleðini, at hann má bíða nakrar dagar til handanina.

– Hetta er fyrsta føroyska, men eisini størsta virðislønin eg havi fingið, so tað eri eg glaður um. Men eg fegnist eisini og seti stóran prís uppá, at Jógvan Isaksen hevur fingið Heiðursgávuna, sigur Zacharias Heinesen, vinnari av Mentanarvirðisløn Landsins 2006.